## Einskilja ísbrótarar

Myndugleikarnir, sum umsita teir donsku ísbrótararnar og umhvørvisskipini, fara eftir øllum at døma at lata privatar kreftir keypa skipini, skrivar Ritzau. Tað er ikki á hvørjum ári, at tær donsku havnirnar hava brúk fyri ísbrótarunum, men verandi skipan hevur víst seg at vera tung at hava við at gera, og so kostar hon 20 mió. krónur um árið. Gongst sum ætlað verður ísbrótaratænastan einskild í hesum árinum ella tíðliga næsta ár.



## Skuldu brúka sama bát

Rúsevnasmuglararnir, sum vórðu tiknir, tá teir herfyri komu til Fáskrúðsfjarðar í Íslandi við einum stuttleikabáti, ætlaðu at brúka ein annan bát til ferðina. Blaðið Vísir skrivar, at smuglararnir ætlaðu at læna bátin Lucky Day, sum ein íslendingur í Stavanger eigur. Hesin báturin var á Fáskrúðsfirði fyri tveimum árum síðani, men eigarin tordi ikki at lata hann fara eina ferð hagar afturat. Tí máttu smuglararnir leiga annan bát í Stavanger til ferðina.

# Lutafeløg líkastillað



*Broytingin í lógini um rentustuðul er ætlaður at líkastilla lutafeløg við privatpersónar, sum byggja sær íbúð*

**Broytingar verða nú gjørdar í lógini um rentustuðul, so lutaíbúðarfeløg eisini verða umfatað av lógini**

RENTUSTUÐUL

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eitt av málunum á landsstýrisfundinum í gjár var broyting í lógini um rentustuðul.

Magni Laksáfoss, fíggjarmálaráðharri, sigur við Rás2, at ætlanin er ikki at broyta lógina sum so uttan at hon nú eisini skal umfata lutaíbúðarfeløg.

- Hetta er fyri at líkastilla hesi við vanliga íbúðarbygging. Á henda hátt sleppa vit undan tí ójavna, sum er í lógini, sigur Magni Laksáfoss.

Sama verður eisini galdandi fyri MVG av íbúðarbygging.

Fíggjarmálaráðharrin sigur, at tað ikki eru gjørdar nakrar ítøkiligar metingar av, hvat hesar broytingar fara at kosta landinum, men hann sigur, at í prinsippinum fer broytingin ikki at kosta nakað.

- Tað verður ikki uttan so, at fleiri íbúðir enn vanligt verða bygdar, at tað fer at kosta landskassanum nakað, sigur Magni Laksáfoss.

Hann sigur víðari við Rás2, at ongar ætlanir eru í løtuni um at skerja rentustuðulin.

- Tíðin er ikki hin rætta í løtuni at skerja rentustuðulin, sigur Magni Laksáfoss.

## Eysturoyar Apotek ISO-góðkent

**Apoteksverkið er komið væl áleiðis at menna eina góðskustýringsskipan grundað á ISO 9001:2000**

ISO-GÓÐKENNING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Eysturoyar Apotek er fyrsta føroyska apotekið við ISO 9001-góðkenning*

Í áliti um framtíðar apoteksverk, sum varð handað landsstýrismanninum í Almanna- og Heilsumálum í juli mánaði 2006 stendur millum annað, at »ætlanin er, at apotekini verða ISO 9001-góðkend av Dansk Standard, og avtala er gjørd um fyrsta eftirlitið í 2007«.

Nú er Eysturoyar Apotek sum tað fyrsta av føroysku apotekunum góðkent sambært ISO 9001 av Dansk Standard.

Í hesum sambandi fer umboð frá Dansk Standard at handa apotekaranum í Runavík, Hjalta Gunnarstein, ISO 9001-góðkeningarskjalið. Handanin fer fram á Eysturoyar Apoteki í dag klokkan 17.

ISO 9001:2000 er greining av krøvum til góðskustýringarskipan, sum ásett av altjóða felagsskapinum International Organisation for Standardization. Til tess at fáa eina ISO 90001-góðkenning krevst, at virki er ført fyri at vísa førleika til áhaldandi at gera eitt produkt, sum lýkur ásettu krøvini. Við at brúka góðskustýringsskipanina til fulnar, miðar virkið eftir at betra nøgdsemið hjá kundunum.




*Lovregister for Færøerne 2007 er útkomin*

# Lovregister 2007 útkomið

**Føroya Landsstýri hevur í fleiri ár saman við Ríkisumboðsmanninum givið út Lovregister for Færøerne. Nú er 18. útgávan útkomin**

BÓKAÚTGÁVA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Lovregister for Færøerne 2007 byggir á undanfarnar útgávur gjøgnum nøkur ár og tað eru Føroya Landsstýrið og Ríkisumboðsmaðurin, ið geva út.

Hendan 18. útgávan er reviderað og dagførd fram til 2007. Uppsetingin sylgir undanfarnum útgávum er sett upp í sama sniði sum Dansk Lovregister hjá Topsøe-Jensen.

Umframt eldri rættarforskriftir umfatar registarið eisini allar núgaldandi lógir, sum hava verið kunngjørdar í Lovtidende A og Lovtidende D, og sum eru settar í gildi í Føroyum.

Hartil eru allar galdandi løgtingslógir og kunngerðir, sum hava verið lýstar í Føroya Kunngerðarsavni, kunngerðir í Lovtidende C, sum eru við í Dansk Lovregister, og sum eru kunngjørdar í Føroyum, umframt týdningarmestu cirkulerini í Ministerialtidende A.

Rættarforskriftir við stuttum gyldistíðarskeiðum, játtanarlógir og løgtingslógit og annað, ið hevur við skuldarbinding, lánsveitan til støk mál og rættarforskriftir, sum annars hava tænt sínum máli, eru tó ikki við, sjálvt um ein formell strikan ikki er farin fram.

Hendan seinasta útgávan er eisini at finna á heimasíðuni hjá Ríkisumboðsmanninum: www.rigsombudsmanden.fo